

# Rentan fer at hækka

Amerikanski tjóðbankastjórin, Ben Bernanke, sigur, at nú altjóða fíggjarkreppan hasar av, fer rentan at hækka. Hann sigur, at tað verður ikki leingi, til amerikanska rentan fer at hækka, og tað kann ávirka rentuna í Evropa. Hægri renta fer at trýsta húsamarknaðin, men hon kann samstundis virka sum eitt tekin um, at heimurin hevur fingið tamarhald á fíggjarkreppuni, so grundarlag verður fyri búskaparligum vøkstri, sigur DR. Tjóðbankar í USA og Evropa hava hildið rentuni niðri fyri at forða fyri einum veruligum búskaparskrædli.



*Hesa vikuna hava teir sett sperrurnar upp í summarhúsunum hjá Starvsmannafelagnum. - Vit verða liðnir hesa vikuna, sigur Johannes Kristensen*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Tað er langt millum at sethús verða bygd í Skálavík. Nú eru teir hjá Multitænastuni á Sandi í holt við eini summarhús í bygdini. - Hetta er fjórða húsið á hesum økinum, sigur handverkarin, Johannes Kristensen*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

*Hesin hemsurin verður helst eitt fínt stað hjá børnum at spæla inni í*

**Sól og frost**

Tá slík arbeiðir eru í gongd her á landi, er spurningurin altíð, hvussu er við veðrinum og ta ávirkan, sum hetta hevur á tíðarætlanina fyri byggingini.

Sigast kann, at teir hava verið rættiliga hepnir við veðrinum. Allar dagarnar í hesi vikuni hevur viðrað av tí allarbesta, - eisini týsdagin, tá Sosialurin vitjaði í Skálavík.

- Jú, veðrið hevur verið sera gott, eisini í síðstu viku og tá vit forskallaðu. Men tá vit stoyptu fundamentið, tá kom frostur á okkum. Tá máttu vit dekka alt til, so tá steðgaði arbeiðið eitt sindur upp, greiðir hann frá.

- Men tað tók kortini ikki skaða av tí, sigur Johannes Kristensen.

## Samstarv við aðrar

Multitænastan hevur nøkur ár á baki, men longu í dag finnast prógv fyri teimum arbeiðunum sum teir hava staðið fyri.

Sum nevnt bygdu teir eini sethús heima á Sandi í fjør. Umframt hetta arbeiðið, tóku teir eisini yvirtromina av einum øðrum húsum, reistu tey og løgdu nýtt tak á.

Eitt annað spennandi samstarv er fingið í lag við fyritøkuna Norðsetur í Hvalvík, sum bæði átekur sær stórar uppgávur og smáar.

Her í Sandoy hevur Multitænastan virkað sum undirveitari av tænastum hjá hesi størri fyritøkuni.

- Vit innrættaðu trý hús fyri teir í fjør, sigur Johannes.

Óhugsandi er ikki, at okkurt annað arbeiði liggur og bíðar, tá hetta arbeiðið í Skálavík er liðugt.

Keypssamtøkan í Hoyvík

FK í Hoyvík sóknast eftir

**Fólki at sita við kassan**



**at byrja 1. mars**

**Arbeiðstíð:**
mánadag - fríggjadag: Frá 8.45 til 14
leygardag: 8.45 - 14.30
frí annanhvøn leygardag,
- miðalarbeiðstíð 23 tímar um vikuna

**Løn:**
Sambært sáttmálan við S & K

Nærri fæst at vita við at venda sær til Bent Lundsgaard, tel 214016

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 18. februar:

**FK Hoyvík**
**Brekkutúni 9**
**FO 188 Hoyvík**
**att: Bent Lundsgaard**
**214016 - bl@fk.fo**